# handVERKARIN

2011 BLAÐ NR. 39 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# SJÚKRAGRUNNURIN BATI ER NÚ OKKARA



*Eli Brimsvík, formaður*

Felagið hevur nú endaliga yvirtikið, sjúkragrunnin Bata.

Tað var soleiðis, at Havnar Handverksmeistarafelag og Havnar Handverkarafelag settu grunnin á stovn í 1971, og hevur hann virka frá 1. mai 1973.

Til samráðingarnar í 2007 var ynski frá Meistarafelagnum, annaðhvørt at niðurleggja grunnin ella, at vit yvirtóku hann.

Havnar Handverkarafelag var og er av tí áskoðan, at grunnurin er eitt gott íkast til tað útgjald, sum fæst frá dagpeningaskipanini, og vildu vit halda áfram við at reka grunnin.

Eftir samráðingar millum feløgini í 2010 varð avrátt, at vit skuldu yvirtaka grunnin, og nú kunnu vit siga, at tað formliga er komið uppá pláss.

Vit hava gjørt neyðugar broytingar, og dagføringar í reglugerðini soleiðis, at hon nú hóskar betur til nútíðina og samfelagið vit liva í. Okkara vón er, at limir okkara framvegis fara at fáa gagn av hesum. Fyribils er ikki ætlanin at gera broytingar í umsitingini av Bata. Í næsta blaði verður meiri útgreina tilfar um Bata.

**Í blaðnum hesa ferð: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . síða**


Broytt limagjald og sjúkragrunnurin BATI . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 2
Limagjald, tímaløn, frítíðarløn, gjøld v.m.. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 3
Sofus Joensen: Gamla pensjónshugskotið hjá nýggja landsstýrinum. . . . . . . . . 4
Lúgva Kaj Leo og Jørgen? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
Petur Juul Jacobsen, stjóri: Limirnir eiga Eftirlønargrunnin við húð og hár . . . . . 17
Yvirlýsing viðvíkjandi skatting av eftirlønargjøldum . . . . . . . . . . . . . . . 20



Útgevari: Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík · Forsíðumynd: Sofus Joensen
Blaðstjórn: Media · Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Skrivstovutíð: Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo · www.handverk.fo


# LIMAGJALD, TÍMALØN, FRÍTÍÐARLØN, GJØLD V.M.

## Limagjald og Lívstrygging:

Frá 1. oktober 2011 er limagjaldið 500,- kr. um mánaðin.

Ein onnur broyting er, at frá 1. oktober verða 75,- kr. lagdar afturat í ómaksgjaldi – hjá teimum – sum ikki hava eina sjálvvirkandi gjaldsavtalu, **(við Gjaldsskipanini).**

Felagið heitir tí á teir limir, sum ikki hava meldað seg til Gjaldsskipanina, um at venda sær til skrivstovu felagsins millum Kl. 9 og 15 (mánadag til hósdag) fyri at fáa hetta avgreitt.

## Kontur at flyta limagjald á:

Konto: 9181 - 133.013.8
Konto: 6460 - 162.935.4

## Tímaløn:

Tímalønin frá 1. oktober 2011:
kr. 125,13 (minstaløn)
3-ára starvsaldur gevur 1,6% lønarhækkan.
Frítíðarløn: 12%
Konto: 6460 - 299.601.6

## Eftirløn:

Arbeiðsgevarin: 13%
Løntakarin: 2% Tilsamans: 15%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9
Vágs Handverkarafelag:
Konto 6460 - 516.417.8

## Sjúkragrunnurin BATI

Løntakarin: 15 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Sjúkragrunnurin BATI
Postboks 3227, 110 Tórshavn.
Tlf. 229578 – fax: 319178.
Teldupostur: hdg@post.olivant.fo
Konto: 6460-4951044
Konto: 9181-4955791

## Lærlingar:

Lærlingar gjalda kr. 10,- pr. viku í limagjaldi.
Konto: 6460 - 401.200.5
Lærlingalønir (% av sveinalønini)
1. árið: 32%
2. árið: 40%
3. árið: 45%
4. árið: 55%
Eftirløn til lærlingar: 7,5%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9

## Eftirútbúgvingargrunnurin VITAN

Arbeiðsgevarin:
10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Løntakarin: 10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Vinnuhúsið
Postboks 1039, 110 Tórshavn.
tlf. 30 99 00 – fax: 30 99 01.
Teldupostur: mikkjal@industry.fo
Konto: 9181 - 495.879.0
Konto: 6460 - 101.278.0

**MINNIST AT KANNA, UM EFTIRLØNARGJALDIÐ ER RÆTT FLUTT**

# GAMLA PENSJÓNSHUGSKOTIÐ HJÁ NÝGGJA LANDSSTÝRINUM



*Sofus Joensen*

Nýggja pensjónshugskotið, sum gongur út uppá at skatta eftirlønargjøld við inngjald í staðin fyri við útgjald stakk seg brádliga upp – eina viku fyri løgtingsvalið.

Tað undraði meg nógv, tí – fyri tað fyrsta – so er skipanin ikki uppfunnin í Føroyum, og hon er bestemt ikki uppfunnin í Fólkaflokkinum. Mær vitandi var Jóannes Ejdesgaard tann fyrsti, sum nevndi eina slíka skipan í Føroyum. Men hugskotið kom ikki úr hansara høvdi. Tað er onki at ivast í, at hugskotið er gitið í Danmark. Grundin til, at eg sigi hetta er, at eg veit, at danskir politikarar spældu sær við tankan fyri nøkrum árum síðani. Men teir tordu ikki at fara undir at realisera eina slíka skipan, tí teir dugdu at síggja, at um teir skattaðu við inngjald, so fór danska samfelagið at fáa álvarsamar

*framhald á s. 6*






SOFUS JOENSEN

trupulleikar, tá eftirlønargjøld skuldu gjaldast teimum, sum høvdu spart upp.

### Eftirlønar bylgjan

Vit kunnu spyrja, hvat samfelagið skal liva av, tá ongin pensionistur skal gjalda skatt, tí eftirlønarútgjaldið er skattað við inngjald.

Og her kunnu vit skoyta uppí, at um nøkur ár vera pensionistarnir kanska líka nógvir í tali, sum tey, sum vera eftir á arbeiðsmarknaðinum. Tá fara tey, sum eru á arbeiðsmarknaðinum ikki at megna at gjalda tann skatt, sum samfelagið, tá ferð at kosta at reka. Tá verður tað ein trupulleiki, at eftirlønargjøldini eru skattað.

Vit kunnu eisini spyrja um vit hava nakra trygd fyri, at okkara politikarar í framtíðini ikki eisini fara at skatta eftirlønir við útgjald; tað hava vit í hvussu er onga trygd fyri.

Lata vit núverandi skipan halda fram, t.v.s. at skatta eftirlønir við útgjald, so verður tað sjálvandi nógv lættari at reka samfelagið í framtíðini, tí tá ferð samfelagið at fáa skatt inn, sum samfelagið ikki fær um inngjøldini vera skattað við inngjald.

Lat okkum eisini nevna, at skatta vit eftirlønir við inngjøld, so verður støðan hjá kommununum nógv verri enn støðan hjá Landskassanum; tað hevur Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík, skilagott greitt frá í bløðunum.

### Kaj Leo og Jørgen

Tað undraði meg serliga nógv, tá ið Kaj Leo Holm Johannesen, og Jørgen Niclasen vóru í sjónvarpinum og søgdu, at teir høvdu funnið útav, at tað var líka mikið um tú skattaði 100,- kr. nú ella tú skattar 100 kr. um 50 ár. Tað var eitt fantastiskt úttalilsi, tí í mínari verð er tað ikki líka mikið.

Lat okkum eisini sláa fast her, at tosa vit um 60-ára konto og kapitalpensjón, so passar roknistykkið hjá Jørgen og Kaj Leo.



*Gudný Skarðhamar*

# SOFUS JOENSEN

Men tað stemmar ikki, tá ið man hevur við eftirlønarskipanir at gera.

## Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags

Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags hevur eina eftirlønarskipan, sum er í trimum. Ein partur er kapitalpensjón, ein lívrenta og ein lutaeftirløn. Tá ið vit tosa um lutaeftirløn og lívrentu, tá er tað ikki líka mikið um tú skattar við inngjald ella við útgjald. Setur tú hesi viðurskifti upp í eitt rokniark, so dugur tú skjótt at síggja, at tað ikki er líka mikið nær útgjaldið verður framt.



*Marita í Brekkunum*

## Onki „Bigg bisniss“

Vit hava sum dømi roknað við einum 5 ára skeiði, og tað vísur eina rættiliga skeiva gongd fyri okkara limir. Tað fyrsta sum hevur týdning er, at vit hava eina skipan soleiðis at limirnir sjálvir eiga grunnin. Tað er ongin annar uttanfyristandandi sum eigur nakað í grunninum, og tá ið Kaj Leo tosar um „bigg bisniss“ hjá tryggingarfeløgum og bankum, so er tað ikki galdandi fyri okkara grunn, heldur ikki tann hjá Føroya Arbeiðarafelag og heldur ikki eftirlønargrunnin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag. Tey bæði feløgini eiga eisini teirra grunnar, og ongin annar fær nakað avkast. Tað er ongin annar, sum fær eitt einasta eitt oyra úr grunnunum enn limirnir í sjálvur. So hatta við „bigg bisniss“ hjá Kaj Leo, tað heldur ikki.

## Okkara skipan

Tað fyrsta, sum hendir er tað, at tá limirnir gjalda inn í grunnin er, at 5% verða tikin av til at reka grunnin fyri. Tað kostar sjálvandi at reka ein eftirlønargrunn. Umsiting okkara skal m.a. deila inngjøldini sundur í tær skipanir, sum vit hava.

Peningin plasera vit partvís uttanlands. Vit rentutilskriva sjálvandi peningin hjá limunum






Linde Gas | AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass

Upplatingartíðir:
mána, -fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo
www.gassola.fo

# GAMLA PENSJÓNSHUGSKOTIÐ HJÁ NÝGGJA LANDSSTÝRINUM

líka til limurin blívur 67 ella 70, alt eftir, hvat limurin velur, og tað kostar pengar. Higartil hevur hetta kostað u.l. 5%. Tað hevur ligið um 25 mió. um árið, sum vit hava fingið inn í eftirlønargrunnin, og við teimum 5 prosentunum klára vit at reka grunnin.



Jonna Skaale

## Syndarliga framtíðin

Tað sum vit nú stúra fyri, er eftir øllum at døma, at Kaj Leo og Jørgen báðir, saman við teimum smáu flokkunum, fara inn og taka helst 35% av tí sum limirnir gjalda inn í grunnin, og tað vil siga, at eftir standa tá einans umleið 15 milliónir krónur.

Tað sigur seg sjálvt, at 5% av 15 mió. er ikki tað sama sum 5% av 25 mio.

So tað fyrsta, sum hendir í okkara grunni er helst, at vit mugu fara eftir einum størri % parti, fyri at hava ráð at reka grunnin. Tað er so ein beinleiðis ávirkan, at vit noyðast at fara í lumman hjá okkara eftirlønarmóttakarum, og mugu taka eitt hægri gjald fyri at kunna halda lív í grunninum. Hetta er ein beinleiðis andsøgn við tað sum okkara háttvirdi løgmaður sigur, t.v.s. at tað kann gera tað sama um tað verður skattað við inngjald ella útgjald, so tann parturin passar ikki.

## Vita ikki hvat teir gera

Tað sum ger okkum ótrygg, og fær okkum upp á dubbarnar er, at okkara politikarar yvirhøvur ikki vita hvat teir gera. Og tí hava vit ikki ánilsi av, hvat tað heila endar við. Vit vita ikki hvat vit skulu gjalda í framtíðini – skulu vit gjalda 20%, 35%, ella 40% í landskassan og hvat skal peningur takast av?

Skal tað verða tikið av áðrenn skatt, og omaná a-inntøkuna, ella skal tað haldast fyri seg sjálvan. Hetta hava vit onga trygd fyri, og tað ger støðuna serliga hættisliga. Tað sum verri er, er at helst vita okkara politikarar heldur ikki vita hvat teir eru í ferð við at gera.

Eg haldi, at tað er rættuliga fantastiskt, at man eina viku áðrenn løgtingsvalið, boðar frá, at man ynskir at innføra eina nýggja skattaskipan, sum gongur út uppá at taka pening frá teimum, sum spara upp í eftirlønargrunnum.

Tað sum er mest løgi er, at samgonguskjalið hjá nýggja landsstýrinum faktist ikki sigur nakað sum helst um, hvussu skipanin skal virka.

## Samráðingar við fakfeløgini

Nýggja samgongan sigur, at hon hevur verið í samráðingum við fakfeløgini um nýggja skatting av eftirlønum. Eg veit so onki um nakrar samráðingar við fakfeløgini.

Tað sum eg havi hoyrt er, at umboð fyri fakfeløgini bara hava fingið at vita, at tit eru fakfeløg og vit eru politikarar, punktum.

Tað, sum eg legði til merkis, tá teir samráddust um samgongu, var tá løgmaður segði, at nú var tað sligið fast við sjeytumma seymi, at tað hevði onga ávirkan um teir skattaðu eftirlønargjøld við inngjøld ella við útgjald. Teir høvdu hvørki lurtað eftir einum ella øðrum, hóast løgmaður segði, at øll skuldu hoyrast.

## Ryssan hjá abbanum

Tað kemur mær fyri, at okkara politikarar líkjast gomlu ryssuni hjá abbanum. Hann plagdi at koyra klaffa fyri eyguni á ryssuni, tí ryssan var so stokkin. Tá klaffin var koyrdur fyri sá ryssan bara beint frameftir, tað er tað, sum eg haldi eyðkennir Føroyskar politikarar allarmest. Teir hava ein sera smalan horisont.

Og vit kunnu spyrja, hvat vit kunnu gera í hesum máli. Eg má siga at tað veit eg ikki rættuliga.

Vit kunnu samstarva við onnur fakfeløg, og mótmæla saman við teimum.

Vit kunnu eisini bara sita og bíða, inntil Knold og Tot hava funnið útav, hvussu teir skulu greiða eftirlønarviðurskiftini.

Tað at serfrøðingar nú eru farnir at rokna uppá tingini, kann kanska hjálpa eitt sindur. Frá serfrøðingum kunnu teir kanska fáa eitt sindur av upplýsingum, um teir í heila tikið lurta eftir nøkrum.



Myndatekst?

# SOFUS JOENSEN

## Aðalfundurin í vár

Til síðsta aðalfund, høvdu vit boðið Kára Petersen, búskaparfrøðingi, at vera við.

Hann greiddi frá sonevndu eldrabylgjuni, sum eisini fór at gera seg galdandi í okkara samfelag. Tá ið vit tosa um avleiðingarnar í samfelagnum, so kunnu vit nevna, at í dag eru fýra fólk á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn, sum er farin frá vegna aldur, og um 40 ár vera einans tvey á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn, sum er farin frá vegna aldur.

## Spurningur til politikararnar

At enda kundi eg hugsa mær, at spurt okkara politikarar, hvat teir ætla at gera við hesi álvarsomu viðurskifti. Uppskriftin, sum vit higartil hava hoyrt um má ikki realiserast. Tað fer at skapa eina vanlukku, tá ein stórur partur av fólkinum einans fer at hava minni eftirløn at dúva uppá. Orsøkin til, at hon verður vánalig er, at hon verður skattað við inngjald.

Politikararnir mugu vera tolnir og bíða við at skatta eftirlønina til hon skal gjaldast limunum. Vit duga øll at síggja, at vit hava eina trupla støðu í samfelagnum. Onkur hevur sagt, at eitt hol er komið í landskassan. Men vit mugu ikki vera ótolin, tí tað er ongin, sum veit um eitt hol ikki aftur er komið í landskassan, um t.d. 40 ár, tá skulu – undir øllum umstøðum – gjaldast nógvar eftirlønir úr eftirlønargrunnunum. Og hvør veit um føroyskir politikarar tá ikki fara at kenna seg noyddar at skatta eftirlønir bæði við inn og útgjald.

Teir fara kanska ikki at nevna tað skatt, tað verður helst talan um eitt serligt avgjald sum skal takast av eftirlønini og koyrast í ein tóman landskassa.

## Okkara royndir

Eg hugsi um, at nú havi eg verið formaður í Eftirlønargrunni Havnar handverkarafelags í nøkur ár, og eg havi altíð verið bangin fyri hesum, sum nú sær út til at fara at henda. Eg havi gjøgnum fleiri ár, ávarað okkara limir um, at fáa politikararnir eyga á peningin í okkara Eftirlønargrunni, so verður vandi á ferð, tí neyvan tola teir at hoyra um henda pening.

Eg kann nevna, at eg minnist, at Jóhannes Ejdesgaard var frammi við nøkrum sitatum, so tað er ikki bara nakað eg havi funnið uppá, men eg havi bara lurtað eftir, hvat politikararnir hava sagt, og ført framt.

Tá var tað, at Ejdesgaard eisini segði, at hann helt, at pensjónspengarnir hjá okkum, lógu helst nógv betri í landskassanum, enn teir gjørdu hjá eftirlønargrunnum.
Eg má siga, at har eru vit ikki samdir.

Tað sum kortini er mest harmiligt er, at inntøkurnar teir fáa burtur úr Eftirlønargrunnunum skulu brúkast til at fíggja ein flatskatt sum Fólkaflokkurin er komin við. Kanska fara teir at gera kubbi í nøkur ár, men tey fara at hevna seg aftur. Eitt liggur undir øllum umstøðum fast – pensionistarnir koma at gjalda gildið.






MINKA UM ORKUNÝTSLUNA Í BÚSTAÐNUM

ORKULÁN

Vit veita fígging til orkusparandi tiltøk í sethúsum og íbúðum

Eigur tú hús ella íbúð, sum tú ætlar at endurnýggja ella umbyggja, er møguleiki at fáa lán frá Húsalánsgrunninum, um tiltakið er orkusparandi.

Húsalánsgrunnurin veitir fígging til m.a. bjálving, nýggj vindeygu, nýggjan húsaklæðning, nýtt tak, hitaskipan.

Vilt tú hava meira at vita um orkulán frá Húsalánsgrunninum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

Ring ella støkk inn á gólvið Yviri við Strond, Tórshavn.

Húsalánsgrunnurin

Yviri við Strond 6 · 100 Tórshavn
Telefon 314583 · www.husalansgrunnurin.fo

ANNIJANNI

Ídnaðar- og garaguhurðar

Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn



rør-tænastan

v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80

Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión



## Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)



MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo







Húsavarðartænastan 10 ár 2001 - 2011

# Ogna tær tín egna húsavørð

*- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð*

sansir.fo

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.*

*Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.*



## Reinsa við turr-ísi

NÝTT

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.



## Betong-saging

NÝTT

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.

**Húsavarðartænastan Spf**
Brattalíð 8 | Tórshavn
hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29

Húsavarðartænastan

# KETILIN

## ...NÝTIST AT SIGA MEIRA?



JÄSPI-ketilin er kendur í Føroyum. Við mest seldum ketlum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

JÄSPI-ketilin fáa tygum hjá Mariu Poulsen.

Ring 312000 og fá eitt óbindandi tilboð!

JÄSPI

**Maria Poulsen**

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo


# LÚGVA KAJ LEO OG JØRGEN?



*Kaj Leo Holm Johannesen*

Týsdagin 8. november vóru umboð fyri yvir 30 fakfeløg á fundi við formenninar fyri politisku flokkarnar, ið samráðast um at gera samgongu. Fyri politisku flokkarnar vóru Kaj Leo Johannesen, Jørgen Niclasen, Kári P. Højgaard og Jenis av Rana møttir. Endamálið við fundinum var at greiða politisku samráðingarluttakarunum frá stóra vansanum fyri bæði samfelag og eftirlønaruppspararar, um pensiónsgjøld verða skattað við inngjaldi ístaðin, sum nú, við útgjaldi.

Umboðini fyri fakfeløgini greiddu fleiri ferðir á fundinum frá, óhepnu fylgjunum av ætlanunum hjá teimum fýra politisku flokkunum. Fakfeløgini hava eisini áður víst á sama boðskap í fjølmiðlunum. Feløgini eru væl vitandi um, at í einum heimi, har hvør uppsparingarkróna verður skattað við sama prosentsatsi í øllum uppsparingartíðarskeiðnum kann grundgevast fyri, at skattatíðspunktið er líkamikið. Tað skal tó undirstrikast uppá tað kraftigasta, at umboðini fyri fakfeløgini staðiliga vístu á, at hetta á ongan hátt heldur í veruliga lívinum.

Kortini segði Kaj Leo Johannesen, løgmaður eftir fundin, at tað varð staðfest við 7 tumma seymi, at tað er líkamikið fyri uppspararan, um pensjónsgjaldið verður skattað við inngjaldi ella útgjaldi. Og Jørgen Niclasen segði, at tað endaliga er sligið fast, frá øllum síðum, at tað einki merkir fyri sjálvan uppspararan nær pensjónsgjaldið verður skattað. Hesar báðar útsagnirnar eru í greiðari andsøgn við tað, ið tosað var um á fundinum. Spurningur kann tí setast við, um Kaj Leo og Jørgen lúgva og um Jenis og Kári tóku undir við hesum.

Tað má vera eitt krav til politikarar, ið sita á ovastu rók, at teir vita, at allar flestu pensjónir vera skattaðar sum a-inntøka við útgjaldi. Í uppskotinum hjá Fólkaflokkinum liggur, at ein botnfrádráttur verður umframt at eingin fer at rinda meira enn 40% í skatti. Í hesum liggur soleiðis eisini, at onkur fer at rinda minni enn 40% í skatti. Við øðrum orðum verður helst talan um progressivan skattaskala. Tá kann mann í øllum førum sláa fast við 7 tumma seymi, at tað als ikki er líkamikið, um pensjónsgjøld verða skattaði við inngjaldi ella útgjaldi. Við botnfrádrátti og progressivum skattaskala vil tann einstaki eftirlønaruppspararin verða verri fyri um skattað verður við inngjaldi.



Jørgen Niclasen

Ein annar møguleiki er, at teir fýra politikararnir hava eina heilt aðra skattaskipan, sum enn ikki tolir dagsins ljós. Fakfeløgini hava fleiri ferðir eftirlýst ítøkiligu ætlanunum fyri skatting av eftirlønunum, men hetta hava teir fýra ikki viljað upplýst.

Politisku ætlanirnar hava eisini enn verri árin á samfelagið og hetta kann gerast ein vanlagna fyri landskassan, soleiðis at allir føroyingar nú kunnu síggja eykarokningar og møguligar eykaskattir fyri sær í framtíðini, um uppskotið hjá Kaj Leo, Jørgen, Kára og Jenis kemur ígjøgnum.

Undirritaðu fakfeløg fara at fylgja gongdini í málinum neyvt.

- Føroya Lærarafelag
- Akademikarafelag Føroya vegna
- Føroya Verkfrøðingafelag
- Magistarafelag Føroya
- Føroya Byggifrøðingafelag
- Arkitektafelag Føroya
- Samtak vegna
- Føroya Arbeiðarafelag
- Havnar Arbeiðsmannafelag
- Føroya Fiskimannafelag
- Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
- Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag
- Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
- Havnar Arbeiðskvinnufelag
- Føroya Handverkarafelag
- Landsfelag Handverkaranna
- HK Føroya Deild
- Yrkisfelag fyri Trygging og Fígging
- Lærarafelag Handilsskúlans
- Føroya Tekniska Lærarafelag
- Starvsfólkafelagið í BankNordik
- Føroya Pedagogfelag
- Almanna- og heilsurøktarafelagið
- Bioanalytikarafelagið
- Maskinmeistarafelagið
- Musiklærarafelag Føroya
- S&K Felagið
- Umboðsráð Tryggingartakaranna í LÍV
- Starvsmannafelagið
- Fysioterapeutfelag Føroya
- Ljósmøðrafelag Føroya
- Kost- og føðslufelag Føroya
- Ergoterapeutfelagið
- Heilsuhjálparafelag Føroya
- Skipara & Navigatørfelagið





# LIMIRNIR EIGA EFTIRLØNARGRUNNIN VIÐ HÚÐ OG HÁR



Petur Juul Jacobsen, stjóri

Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelag varð stovnaður í 1999, og endamálið er sambært viðtøkunum, at umsita eftirlønirnar hjá limunum í grunninum. Grunnurin hevur einans „eitt slag av virksemi", sum er eftirlønarvirksemi; tað vil siga, at ongin tryggingarpartur er í grunninum.

Í grunninum er ein nevnd, sum verður vald á aðalfundinum, har tríggir limir verða valdir av limunum í grunninum, og nevndin í Havnar handverkarafelag tilnevnir tveir limir. Nevndin hevur ábyrgdina av grunninum ímillum aðalfundirnar, og nevndin setur ein stjóra, sum tekur sær av tí dagligu leiðsluni.

## Støðan í dag

Tá ið goldið verður inn í grunnin, verður ein prosentpartur (í løtuni 5%) tikin av til umsiting, og restin verður so býtt sundur á tey trý eftirlønarsløgini, sum er lutaeftirløn, persónlig konto (kapitaleftirløn) og ein lívrentuskipan.

So hvørt sum limirnir gjalda inn verða øll inngjøld bóka á hvørja einstaka konto hjá hvørjum einstøkum limi.

Upphæddin verður standandi og verður økt við einari leypandi rentutilskriving ár um ár.

## Útgjald eftir galdandi skipan

Tá ið limur er komin til eftirlønaraldur ella, tá limur annars hevur rætt til at fáa útgjald, so verður nettoupphæddin útgoldin, og býtt sundur á tey trý eftirlønarsløgini, og goldin út

# LIMIRNIR EIGA EFTIRLØNARGRUNNIN VIÐ HÚÐ OG HÁR

á tann hátt, at lívrenta og lutaeftirløn fer yvir skattaskipanina, og kapitaleftirløn verður útgoldin við einum avgjaldi, sum í løtuni er 35%.

Tá ið útgoldið verður um skattaskipanina, verður útgjaldið skattað soleiðis, sum skattalógin ásetur. Tað vil siga, at tað verður rokna, sum vanlig skattskyldug inntøka. Her er talan um lívrentu og lutapartin. Hetta verður lagt afturat skattskyldugari inntøkuni hjá liminum.

## Nýggja skipanin

Tað nývalda landsstýrið hevur í hyggju, at broyta pensjónsviðurskiftini soleiðis, at í staðin fyri at skatta eftirlønina, tá hon verður útgoldin, so skal eftirlønin skattast so hvørt, sum hon verður goldin inn í grunnin. Og pástandurin hjá landsstýrinum um, at tað er líka mikið fyri eftirlønarmóttakaran, um skatturin verður goldin nú, ella tá eftirlønin verður útgoldin til limin, heldur ikki í veruleikanum. Man kann kanska siga, at tað er ein sannleiki við modifikatiónum.

## Eitt einfalt dømi

Vit kunnu taka eitt einfalt dømi, har man kanska kann nikka ja, og siga, at tað er soleiðis tað hongur saman. Tað er eitt dømi har vit við verandi skipan seta 100 kr. inn á eina konto, og fáa 10% í rentu. Tá árið er liðugt, taka vit peningin út sum eftirløn, gjalda 35% í skatti, og sita eftir við 71,50 kr.

Við tí nýggju skipanini gjalda vit 100 kr. inn, og gjalda 35 kr. í skatti beinan vegin, og hava so 65% eftir.

Leggja vit 10% í rentu afturat teimum 65, so er rentan 6,50 kr. og vit enda aftur á 71,50 kr.

Hetta er tað einfalda dømi, har tú setur pengar inn á eina konto, og einki annað hendur uttan rentutilskriving, so hevur tú pengarnar, tá ið tú skalt brúka teir.

## Veruleikin er ein annar

Men tá ið vit tosa um eftirløn, tá er roknistykkið ikki so einfalt, tí nógv ymist annað hongur uppi í, t.d. umsitingarkostnaður o.a.

Og tá ber ikki til at pástanda – yvir ein kamb – at úrslitið neyvt verður tað sama. Vit kunnu siga tað uppá tann mátan, at nú er hetta dømið sett upp, sum eitt einfalt dømi, tí tað er eingin greið útmelding komin frá landsstýrinum um, hvussu man ætlar at gera hetta til veruleika, annað enn, at tað er ein setningur í samgonguskjalinum, sum sigur pensjónir verða skattaðar við inngjald. Og tí ber sjálvandi ikki til at seta eitt roknistykkið upp har, ið meira umfatandi ting verða tikin við enn tað, sum er í tí einfalda roknistykkinum, sum bleiv sett upp omanfyri.

## Umsitingin

Tann umsitingarligi parturin verður eisini ávirkaður, um landsstýrið velur at skatta eftirlønir við inngjald. Hettar fer at geva eftirlønarfeløgunum í Føroyum, nakrar umsitingarligar avbjóðingar tí tey flestu fara at koma í ta støðu, at tey fara at hava tvær uppsparingar – eina, sum ikki er skatta, og eina sum er skatta.

## Nýggjar EDV skipanir

Tað skal so hvørt eftirlønarfelag taka sær av – at gera sína edv-skipan klára til tað, og tað fer sjálvandi at hava eykakostnað við sær, og tann parturin fer so ivaleyst at merkjast hjá tí einstaka uppspararanum við einum hægri umsitingargjaldi.

Landsstýrið hevur heldur ikki sagt, hvussu man ætlar at krevja nýggja skattin inn, tað eru tey 40%, sum man hevur boða frá sum mestamark.

Onki greitt útspæl er komið um tað. Um tað skal vera hvørt einstakt eftirlønarfelag, sum skal avrokna t.d. mánaðarliga, kvartalsliga o.s.v.

Tí størri títtleikin verður so fer tað av sær sjálvum at skapa størri umsiting. Tað verður í hvussu er ein avbjóðing hjá hvørjum eftirlønarveitara.

Tað kann hugsast, at tann trupulleikin verður loystur við tí nýggju pensjónsskipanini, tá hon kemur í gildi. Tað verður møguliga gjørt soleiðis, at útgoldin løn verður skattað, og inngoldin eftirløn verður skattað í sama viðfangi, men tað er so heldur eingin útmelding komin um tað.

Men um hendan nýggja skipanin skal setast í verk 1. januar 2012, so er skotbrái sera stutt, og tað kann hava við sær stórar avbjóðingar fyri eftirlønarfeløgini.

Og tað fer – alt annað líka – at føra við sær ein eyka kostnað, sum kanska er óneyðugur, um landsstýrið bíðar eitt ár við sínum ætlanum, og hugsar seg betri um.



*Frá vinstru: Óla Jákup Kristoffersen, Sofus Joensen, Bjarni Peturson, Koos Kaminga og Palli Djurhuus*

KÁRI PETERSEN

# SKATTING AV EFTIRLØN, TÁ HON VERÐUR INNGOLDIN




*Kári Petersen*

Politisku flokkarnar, sum eru í samgongusamráðingum, Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava vent sær til Fíggjarmálaráðið og pensjónsnýskipanar-arbeiðsbólkin við uppskoti um, at skattur skal gjaldast av eftirløn, tá hon verður inngoldin, til stuttorðað ummæli. Skotbráið til hesa viðgerð hevur verið sera stutt.

Atli Suni Leo úr Fíggjarmálaráðnum og Kári Petersen úr pensjónsnýskipanarbólkinum hava 7. november verið á fundum við politisku flokkarnar í samgongusamráðingum. Miðað hevur verið ímóti at fáa svarað sum flest av teim spurningum, sum vóru reistir á hesum fundum. Somuleiðis eru tær upplýsingar, sum komu fram á fundunum tiknar við í metingarnar av skattainntøkunum.

## Inngangur

Verandi eftirlønarskattaskipan byggir á, at eftirlønarinngjøld ikki verða skattað, tá tey verða ingoldin. Eftirlønaruppsparingin verður tí skattað, tá hon kemur til útgjaldingar.

Arbeiðsbólkurin er biðin um at ummæla uppskot um, at skipanin verður broytt soleiðis, at eftirlønarinngjøld verða skattað, tá tey verða inngoldin, og at eftirlønin ikki verður skattað, tá hon verður útgoldin.

Arbeiðsbólkurin skal stutt greiða frá fyrimunum og vansum av at gera omanfyrinevndu umlegging.

## Hvørjar skipanir hava onnur lond ?

Flestu ES lond hava skipan har:

- Skattafrádráttur verður veittur við inngjald
- Avkastið verður ikki skattað
- Útgjaldið verður skattað

Tó verður avkastið skattað í Danmark, Svøríki og Italia. (Kelda: Nicholas Barr og Peter Diamond, Pension Reform – a Short Guide, Oxford University Press 2010)

*framhald á s. 22*





# SKATTING AV EFTIRLØN, TÁ HON VERÐUR INNGOLDIN

## Hví verður skattafrádráttur veittur, tá goldið verður inn til eftirløn ?

- Skattafrádráttur motiverar til uppsparing.
- Inngjald til uppsparing minkar tøku inntøkuna.
- Útseting av skattinum hjálpir ríkiskassunum (landskassanum), við tað at hann fær eitt munandi størri skattagrundarlag, tá eftirlønirnar koma til skattingar, so hvørt sum talið av eldri fólki veksur.

Hesar tríggjar grundgevingar eru tær týdningarmestu, og verða nevndar í lærubókum í eftirlønarbúskapi. (Kelda: Nicholas Barr og Peter Diamond, Pension Reform – a Short Guide, Oxford University Press 2010.)

Ein høvuðsfyrimunur av at skatta við útgjald, er sostatt, at stóru árgangirnir av eldri fólki fíggja ein stóran part av vaksandi fólkapensjóns- og eldrarøktarútreiðslunum við skattinum og mótrokningini av teirra egnu uppspardu eftirløn.

## Skattainntøkur av uppskotinum.

Inngjøld til eftirløn og tryggingar verða leysliga mett til umleið 550-600 mió. kr. árliga. Verður talið sett til 570 mió. kr., so kann roknast við at um 1/3, ella umleið 190 mió. kr. verður goldin til tryggingar, meðan um 2/3, t.e. umleið 380 mió. kr. verða goldnar til eftirlønarskipanir.

Á fundunum við politisku flokkarnar varð upplýst, at støði var tikið í, at skattaprosentið skal vera um 40 prosent.

40 prosent í skatti av 380 mió. kr. verður 152 mió. kr.

Víst skal vera á, at við verandi skipan vera skattainntøkur av eftirløn býttar millum land og kommunur.

Verður pensjónsnýskipanin samtykt, fara eftirlønarinngjøldini at veksa upp í 800 mió. kr. tey næstu 10 árini. Skattainntøkan fer sostatt at veksa úr umleið 150 mió. kr. árliga upp í 320 mió. kr. árliga.

Á fundunum við politisku flokkarnar varð komið inn á, um møguligt eisini er at skatta inngjøld til tryggingar, og at gera tryggingargjøld skattafrí við útgjald. Víst varð á, at verður samlaða upphæddin, sum verður inngoldin til eftirløn og til tryggingar skattað, so verður skattainntøkan við 40 % skatti um 228 mió. kr.

Skal landskassin skatta inngjøld til tryggingar, t. d. lívstryggingar og óarbeiðsføristryggingar, so fer landsstýrið inn í eina langsiktaða privatrættarliga avtalu, har tryggingarfelagið og borgarin hava gjørt eina avtalu við støði í galdandi lóggávu, har inngjøld ikki verða skattað, meðan útgjald verður skattað. Nógvir borgarar hava longu goldið inn í nógv ár undir verandi fyritreytum.

Undirritaðu ynskja ikki at meta um broyting av hesum viðurskiftum er ynskilig ella forsvarlig búskaparliga, men halda at løgfrøðingar eiga fyrst at meta um hetta ber til at gera.

## Fíggjarpolitiskt haldføri

Í uppskotinum til Pensjónsnýskipan 2011 er roknað við, at helvtin av eftirlønaruppsparingini kemur aftur til landskassan sum mótrokning (minkaðar fólkapensjónsútreiðslur) ella sum skattur.

Við verandi skipan, har skattur verður goldin við útgjald av uppsparingini førir ein økt eftirlønaruppsparing til eitt munandi lægri hall á fíggjarlógini í framtíðini.

Sí hjálagda rokniark: **Eldraútreiðslur, skattur og mótrokning í eftirlønaruppsparing.**

Í øðrum teigi sæst, at eldraútreiðslurnar fara at veksa við 1,3 mia. kr. fram til 2050.

Í sætta teigi (nettoútreiðsluvøkstur 1) sæst, at verður pensjónsnýskipanin sett í verk, so økist hallið á fíggjarlógini ikki við 1,3 mia. kr., men „einans“ við 900 mió. kr. í mun til um einki verður gjørt.

Í níggjunda teigi (nettoútreiðsluvøkstur 2) sæst, at verða eftirlønargjaldingar skattaðar við inngjald, so økist hallið á fíggjarlógini uppaftur í 1,2 mia. kr.

Talvan vísir, at við verandi skipan og við kravdu uppsparingini í pensiónsnýskipanini, so verður ein týðandi partur av eldraútreiðsluvøkstrinum dekkaður av øktum skatti av eftirlønaruppsparingini og mótrokning í fólkapensjónini vegna økta eftirlønarinntøkur.

Skattingin og mótrokningin av eftirlønaruppsparingini er sostatt ein týðandi partur av fíggingini av øktu eldraútreiðslunum í framtíðini.

Verður skattur goldin av eftirlønarinngjøldum, sum í ætlaða uppskotinum, gevur hetta eina munandi meirinntøku til landskassan, og hetta minkar um hallið á fíggjarlógini, í øllum førum tey fyrstu árini. Sum sæst í tíggjunda teigi uppviga inntøkurnar frá ætlaða eftirlønarskattinum vøksturin í eldraútreiðslum í 2020.

Fyri at gera eina forsvarliga meting, um hvussu ætlaði eftirlønarskatturin ávirkar hall landskassans og búskap landsins sum heild uppá longri sikt, má gerast ein størri útrokning og meting, sum bæði byggir á metingar um búskaparvøkstur, demografiskar broytingar og møguliga eisini metingar, um hvussu skatturin ávirkar samlaðu uppsparingina, m.a. tað fyribrigdi, at árliga uppsparingin, sum fer til eftirlønarfeløg og peningastovnar verður um helvtina minni enn í dag.

Undirritaðu halda seg ikki á forsvarligan hátt kunna gera eina slíka samanbering millum verandi skipan og ætlaðu skipanina við stuttum skotbrái.

## Insitamentið minkar at gera sjálvbodna eftirlønarskipan

Við ætlaða uppskotinum er vandi fyri, at tey, sum sjálvboðin spara upp til eftirløn, fara at spara minni upp. Í fyrsta lagi verður skatturin tikin av eftirlønini við inngjald. Eru so útlit til, at landskassin verður í trongstøðu, tá hesir borgarar gerast pensjónistar, so kunnu tey vænta at verða mótroknað í fólkapensjónini, um tey hava eina góða eftirlønaruppsparing. Vandi er tí fyri at tey gevast sjálvboðin at spara upp til eftirløn, men heldur velja at seta sína fríu uppsparing í aðra fíggjarliga uppsparing, fastognaruppsparing ella aðra uppsparing, sum landskassin ikki kann mótrokna í.

*framhald á s. 28*

# Vinnugrundstykki á Skarðshjalla til sølu

**Nú hevur tú møguleikan at ogna tær byggibúgvi vinnugrundstykki á Skarðshjalla.**

Sum framhald av útstykkingini á Sandvíkarhjalla, útstykkjar kommunan umleið 15.800 fermetrar til vinnugrundstykki á Skarðshjalla.

Grundstykkini eru ætlað til framleiðsluvinnu, byggivinnu, bilasølu, verkstaðir og líknandi vinnur, sum eru umhvørvisflokkaðar í flokki 3 til 6.

**STØDD AV GRUNDSTYKKJUM**
Støddin á grundstykkjunum verður millum 800 og 1.800 fermetrar.

Grundstykkini verða útgrivin og grovplanerað, og verður fjarðhiti, vatn, kloakk og el lagt inná hvørt stykkið.

**Kostnaður**
Mettur fermeturprísur er. kr. 1.250,00

Helvtin av metta kostnaðinum, fellur til gjaldingar við undirritan av fyribilsskeyti, og restin fellur til gjaldingar, tá ið økið er liðugt byggibúgvið og grundstykkini eru matrikulerað.

**Tíðarætlan**
Fyrstu stykkini verða ætlandi byggibúgvin á heysti 2011.

**FLEIRI UPPLÝSINGAR**
Um tit vilja ogna tykkum eitt stykki, ella um tit hava spurningar í hesum sambandi, kunnu tit venda tykkum til løgdeildina á telefon 302010 ella senda okkum teldubræv á torshavn-@torshavn.fo

Tað skal viðmerkjast, at nøkur av stykkjunum eru avløgd.

Sí annars meira á torshavn.fo.

www.torshavn.fo




Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo




BYGMA
BALSLEV

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar







# Heildarloysnir frá Articon

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

## Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika

Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo



# SKATTING AV EFTIRLØN, TÁ HON VERÐUR INNGOLDIN

Avkast av eftirlønaruppsparing er skattafrítt, og tískil eru útlit til, at tað kortini vera nøkur, sum velja sjálvboðin at spara upp fyri at fáa henda skattafyrimunin av eftirlønaruppsparingini.

Um pensjónsnýskipanin verður samtykt, má roknast við at samlaða eftirlønaruppsparingin kortini fer at veksa komandi árini orsakað av uppsparingarkravinum í nýggju eftirlønarskattalógini.

## Umsitingarlig atlit

**Eftirlønaruppsparingin verður samansett av skattaðum og óskattaðum skipanum.** Verður uppskotið framt í verki, fara øll at hava tvær uppsparingar, eina skattaða eftirløn og eina óskattaða. Hetta fer at gera tað neyðugt hjá øllum at hava minst tvey eftirlønardepot. Hetta økir um fyrisitingarliga kostnaðin í eftirlønarfeløgunum og peningastovnunum. Fólk fara heldur ikki at hava so gott innlit í egin eftirlønarviðurskifti, tí tey skulu halda skil á virðinum á skattaðum og óskattaðum eftirlønaruppsparingum.

Um pensjónsnýskipanin verður sett í verk, so er ein fylgja, at fólk fara at fáa tvær uppsparingar-skipanir, eina við gamlari uppsparing eftir verandi reglum, og eina uppsparing við nýggjum reglum.

Um nýggja skattaskipanin verður sett í verk við øðrum byrjanardegi enn pensjónsnýskipanin fara øll tískil at enda við trimum uppsparingarskipanum. Hetta hevði ført til enn størri fyrisitingarkostnað hjá eftirlønarfeløgum og peningastovnum, og at pensjónsuppspararar í enn størri mun høvdu mist innlitið í egin eftirlønarviðurskifti.

Um lagt verður um til ætlaðu skattaskipanina, verður sostatt neyðugt, at hon fær sama byrjanardag sum pensjónsnýskipanin fyri at uppspararar ikki skulu enda við trimum uppsparingarskipanum í part.

**Mótroknað verður í fólkapensjónini við bæði skattaðum og óskattaðum útgjaldingum.**

Verður uppskotið framt í verki, so skal mótroknast í fólkapensjónini við støði í arbeiðsinntøku (sum er skattskyldug), og við støði í óskattaðari eftirløn (sum er skattskyldug), og við støði í skattaðari eftirløn (sum ikki er skattskyldug). Roknast má við, at fólk av hesi orsøk fara at fáa versnandi innlit í egin eftirlønarviðurskifti.

Hjá teimum, sum flyta til Danmarkar í pensjónsárunum kann tað geva trupulleikar, at hava eina skattaða og eina óskattaða eftirløn. Annar er, at danskar skipanir skulu taka atlit til, at skattur longu er goldin av summum eftirlønarinntøkum, og hin er, at danskir almannamyndugleikar skulu taka atlit til, at mótroknast skal í fólkapensjónini bæði við støði í einari skattaðari og einari óskattaðari eftirløn.

**Tey, ið gjalda til danskar eftirlønarskipanir, mugu hava tvær uppsparingarskipanir.**

Tey, ið gjalda til danskar eftirlønarskipanir mugu hava tvær eftirlønarskipanir, eina skattaða og eina óskattaða skipan. Donsku eftirlønarfeløgini mugu tí hava tvær skipanir fyri hvønn uppsparara. Undirritaðu hava ikki enn kannað, í hvønn mun hetta kann fara at geva umsitingarligar trupulleikar.

## Niðurstøða

Undirritaðu halda ikki, at tað við stuttum skotbrái ber til at gera eina forsvarliga meting av, hvussu eitt tílíkt uppskot ávirkar fíggjarviðurskifti landsins og landsins búskap sum heild.

Uppskotið leggur seg út í avtalur, sum fleiri túsund borgarar hava gjørt við teirra arbeiðsgevarar og eftirlønarveitarar.

Uppskotið er í stóran mun irreversibult, t.e. avgerðin kann ikki gerast umaftur, um landskassin fyrst hevur tikið peningin inn í skatti, og síðan nýtt hann til økta nýtslu ella lækking av skattum.

Uppskotið broytir avgerðargrundarlagið fyri langsiktaðum íløguavgerðum hjá øllum eftirlønar- uppspararum, og kann tískil føra til, at eftirlønaruppsparingarhugurin ávirkast munandi.

Undirritaðu fara tí staðiliga at mæla frá, at eitt tílíkt uppskot verður framt í verki, uttan so, at fakliga væl grundað lýsing av avleiðingunum verður gjørd fyrst.

Undirritaðu hava bert lýst tey viðurskifti, sum kunnu lýsast við stuttum skotbrái.

Uppskotið økir um fíggjarpolitiska rásarúmið uppá stutt sikt við umleið 150 mió. kr. árliga fyri land og kommunur tilsamans, og uppí umleið 300 mió. kr. ár 2020.

Longri frammi í tíðini, aftaná 2030, missur landskassin 3-400 mió. kr. árliga, av tí at útgoldnað eftirlønaruppsparingin ikki tá kann skattast.

Fyri at finna fram til, í hvønn mun hesin langsiktaði missur kann fáast innanaftur við ætlaða eftirlønarskattinum, er neyðugt at gera eina greining, ið lýsir ávirkanina á fíggjarviðurskifti landsins uppá longri sikt, og sum eisini tekur stóru demografisku forskjótingarnar komandi árini við í metingarnar.

Útreiðslutrýstið á landskassan verður munandi størri í framtíðini, tí útreiðslurnar til fólkapensjón og eldrarøkt og sjúkrarøkt veksa skjótt.

Verandi skattaskipan førir við sær, at vaksandi talið av eldri fólki hava fíggingina við sær við teirra egnu eftirlønaruppsparing.

Ivasamt er hvussu skatting av eftirlønarinngjøldum fer at ávirka fíggjarviðurskifti landsins og búskap landsins uppá longri sikt.

Undirritaðu skulu tí sum nevnt omanfyri, staðiliga mæla frá, at uppskotið verður framt í verki, uttan so, at fakliga væl grundað lýsing av avleiðingunum verður gjørd fyrst.

*Tórshavn, 11. november 2011*

*Pensjónsnýskipanararbeiðsbólkurin*
*Fíggjarmálaráðið*

*Kári Petersen*
*Ina Hammershaimb*
*Atli Suni Leo*


Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
VARTA
Battaríir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battaríir
Panasonic
Heil- og smásøla, landsins bestu battaríir, og landsins bestu prísir
POLAR
Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 fartel. 21 28 60


Tú ert handverkarin!
... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín
Vit kunnu bjóða
• spennandi arbeiðsuppgávur
• ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
• starvsfólkamenning
• trivnað
Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv
ELECTRIC
Hoyviksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo
LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice
Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20


Glarmeistarin v/Poul Guttesen.
Søla og montering av lágorkutermorútum, u-virði níður í 0,4.
Einkultglas, spegl, herða glas til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466


elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl


mazda
Tann nýggi 6'arin er komin
ZOOM-ZOOM
mazda 6
Bilasølan
www.mazda.fo

PENSJÓN

# Áðrenn tú hevur vent tær, er framtíðin her

Tosa við okkum um tína pensjón í dag



**Skjótt skulu allir føroyingar gjalda til egna pensjón, og við tíðini fara minst 15 % av tíni løn til pensjón. Vit geva tær møguleika at velja millum fleiri sløg av pensjónum.**

**Vel millum:**

- ↘ **Kapitalpensjón** - tá ført tú pensjónina goldna út í einum
- ↘ **Lutapensjón** - tá ført tú pensjónina goldna út í lutum yvir í minsta lagi 10 ár
- ↘ **Lívrentu** – tá tryggjar tú tær eitt mánaðarligt útgjald, so leingi tú livir

**Set teg í samband við okkum í dag og tekna pensjón, tí áðrenn tú hevur vent tær, er framtíðin her.**

Vit samstarva fyri at veita
tær eina enn betri tænastu

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Eik

Betri pensjón